## DAGSINS MEINING

# Altjóða lógloysi

Tað er komið í ljósmála, at amerikanska fregnartænastan CIA rekur umfatandi ólógligt virksemi á mongum økjum uttan fyri USA. CIA burturflytir fólk, rekur loyniligar fangalegur, fremur píning av fangum og letur ávís lond fremja ræðuligar gerðir móti einstaklingum til tess at fáa hesar at tala. Hartil kemur, at flogfør hjá CIA hava flogið ígjøgnum loftrúmið hjá fleiri europeiskum londum við loynifangum. Fáur veit, hvaðan hesar fangar koma, og enn færri vita, hvagar teir fara. Við hvørt enda teir á Guantanamo og við hvørt enda teir á loyniligum plássum í Eystureuropa ella í Miðasia. Vanliga enda hesir sostatt í londum, har eingin virðing er fyri mannarættindum og har loyvt er myndugleikum at pína fólk til tess at fáa tey at viðganga, at tey eru yvirgangsfólk og at fáa tey at geva upp onnur verulig ella uppfunnin yvirgangsfólk. Hetta er at fremja altjóða lógloysi.

Hetta er jú tann reina miðøld ella tað, sum verri er. Hetta fyri einhvønn prís at fáa fáa fangar at viðganga brotsverk ella hvat tað nú kann vera, var eyðkenni fyri inkvisitión og heksajakstran. Hetta eigur als ikki at koma fyri í einum framkomnum samfelagi. Men hetta er altso gerandiskostur í ávísum londum, sum USA samstarvar við. Amerikanskir myndugleikar rinda hesum londum pening fyri at fáa upplýsingar burturúr fangum, sum er undir illgruna fyri yvirgangsvirksemi. Tá tað er alkunnungt, at fólk viðganga, hvat tað skal vera, um tey koma undir hart likamligt ella sálarligt trýst, eru teirupplýsingar, sum koma fram á hendan hátt uttan virði og hartil mangan beinleiðis skaðiligir. Me tað, sum mest telur, er sjálvsagt, at tað er ímóti øllum skrivaðum og óskrivaðum lógum í framkomna heiminum at fremja tortur fyri at fáa upplýsingar.

USA hevur sett seg á odda í stríðnum fyri fólkaræði og mannarættindum. Ja, landið hevur byrjað fleiri kríggj við tí grundgeving, at mannarættindi skulu tryggjast. Sasmtundis verður so avdúkað, at USA við fregnartænastu síni CIA fremur gr brot á mannarættindi. Við hesum setir USA seg undir liðini av teimum verstu einaræðislondum í heiminum. Tað er ikki ov nógv sagt, at USA nærkast gamla Sovjet í rættarloysi og brotum á heilt vanlig grundleggjandi mannarættindi. At hetta alt verður framt við tí fyri eyga at verja fólkaræðið í USA og vesturheiminum - at berja niður yvirgang, er eingin umbering. Ein kann ikki við slíkum framferðarhátti verja fólkaræðið tíðansheldur útrudda yvirgang. Fólkaræðið fær skaða og yvirgangurin bert stendur við og versnar. Tí má USA taka annað skinn um bak.

**Sosialurin**

# Degn's hús – ein spurningur um kenslur

**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri í Tórshavnar kommunu*



Bjørn á Heygum hevur grein í bløðunum, har hann tekur rættiliga dýran til og skírir málið um Degn's hús at snúgva seg um avpressing og fíggjarligt svans. Somuleiðis staðfestir hann, at gamla miðbýarumhvørvið í Havnini longu er oyðilagt og bøtist ikki, óansæð hvat hendir við Degn's húsi.

At gera hetta mál til nakað so einfalt sum ein spurning um krónur og oyru, ber ikki til. Jú, um tað bert er peningi, ein hevur kenslur fyri. Men tey mongu, ið hava kenslur fyri okkara gamla og hugnaliga miðbýi í Havn við Vaglinum sum náttúrligum miðdepli, hugsa neyvan bara um krónur og oyru.

Ein og hvør dugir at síggja, at gamli miðbýurin og Vaglið verður ongantíð tað sama aftur, um ein stórur handils- og skrivstovubygningur í fleiri hæddum verður reistur á stykkinum, har Degn's hús standa.

Bjørn á Heygum nevnir tær túsundtals undirskriftirnar, ið vórðu innsavnaðar ímóti ætlanini at ríva Degn's hús og byggja stórt og nýtt í staðin. Tá yvir 4.000 fólk skriva undir, má tað sigast at vera ein góð vegleiðing og ein góð mynd av, hvørjar kenslur fólk hava. Tí er avgjørt einki forgjørt í, at vit sum kommunalpolitikarar í høvuðsstaðnum eisini virða eitt so fjølment ynski.

Tað er sjálvandi ein stór uppgáva hjá býráðnum at umsita skattapeningin hjá borgarunum so skynsamt sum gjørligt, men tað er ikki einasta uppgávan. Í hesum føri er annar tørvur mettur hægri, og eg ivist onga løtu í, at havnarfólk fara at fegnast um, at hetta stig verður tikið fyri at varðveita ein kæran blett av gomlu Havnini, so hann fær frið at verða verandi tað, hann er.

At gamli miðbýurin í Havnini óivað hevði verið vakrari og hugnaligari, um ikki nógv av tí varð bygt, sum longu er bygt, er einki at ivast í. Men fyri tað um nógv er komið upp at standa, ið kanska ongantíð átti at komið, eigur tað ikki at merkja, at tað ikki ber til at varðveita tað, ið enn kann varðveitast.

Tað er eisini ein uppgáva og ein ábyrgd hjá okkum, ið eru vald at umsita høvuðsstaðin, at vit taka fyrilit fyri tí, ið er partur av identitetinum hjá býi okkara. Tað kann kosta, ja, men gjørdu vit tað ikki, hevði prísurin óivað verið nógvar ferðir størri, tí tað er altso ikki alt, ið kann gerast upp í krónum og oyrum!

# Yvirtøka av útlendingamálum loysir ikki trupulleikarnar



**Tað er ein undanførðsla, tá sagt verður, at trupulleikin viðvíkjandi útlendingamálum liggur í, at lógin er donsk**

**Helgi Abrahamsen**

Útlendingamál fingu nógva umrøðu í farnu viku, eftir at Dagur og Vika týskvøldið vísti eitt innslag um eini hjún, sum møguliga noyðast av landinum, tí tey fáa ikki longt arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Nýggi landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jacob Vestergaard, segði við Útvarpið í hesum sambandi, at ein trupulleiki viðvíkjandi útlendingamálum er, at løggávan á økinum er donsk. Hetta sama varð eisini borið fram av fleiri tingmonnum undir orðaskiftinum í sambandi við munnligar fyrispurningar seinasta mikudag. Har varð víst á, at málsøkið má yvirtakast, so skil kann fáast á útlendingamálunum.

### Yvirtøka og hvat so ?

Tað sum undrar meg við hesum, er, at eingin av teimum sum í løgtinginum mæltu til at yvirtaka útlendingamál, hevði nakað ítøkiligt uppskot um, hvat skuldi broytast í lógini, eftir at málsøkið er yvirtikið. Ein fekk varhugan av, at yvirtøkan í sær sjálvari skuldi loysa allar trupulleikar. Eg skilji als ikki hetta sjónarmiðið, tí er tað løggávan á økinum sum er trupulleikin, so hava donsku myndugleikarnir fyri langari tíð síðani boðað frá, at teir eru til reiðar at broyta lógina eftir ynskjum úr Føroyum. Tí kann trupulleikin ikki liggja í, at lógin er donsk. Mær vitandi er heldur einki ynski sent úr Føroyum, um at fáa lógina broytta.

### Løgin upprudding

Mikukvøldið skrivaði fráfarni landsstýrismaðurin, Jógvan við Keldu í Dimmalætting, at útlendingamálsøkið var ein hurlivasi, tá hann kom í landsstýrið, men at uppruddingararbeiðið nú var sett á skinnara. Hvussu Jógvan við Keldu hevur klárað at rudda upp í Tinganesi, meðan óruddið lá í Keypmannahavn, er mær ein gáta. Har er okkurt, sum ikki samsvarar. Tað at hann hevur ruddað upp í Føroyum, má avgjørt merkja, at trupulleikin eisini hevur ligið her.

### Skjótari avgreiðslutíð uttan lógarbroyting

22. november boðaði Innlendismálaráðið frá, at ummælistíðin í sambandi við útlendingamál hevur í ár verið 36 dagar í meðal, ímóti 107 døgum í meðal í fjør. Innlendismálaráðið hevur sostatt stytt viðgerðartíðina við 71 døgum eftir einum ári, uttan at neyðugt hevur verið at broyta lógina og uttan at málsøkið er yvirtikið. Sigur tað ikki nakað um, hvar trupulleikin hevur ligið ?

### Búskapar- og løgfrøðingafelagið

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya sigur í skrivi fríggjadagin, at ein orsøk til trupulleikarnar viðvíkjandi arbeiðs- og uppihaldsloyvum er, at miðfyrisitingin varð skerd munandi herfyri, og hetta hevur avmarkað arbeiðsorkuna í Innlendismálaráðnum. Hetta samsvarar illa við fráboðanina frá Innlendismálaráðnum um, at viðgerðartíðin nú gongur skjótari. Men um trupulleikin er, sum Búskapar- og Løgfrøðingafelagið sigur, ein ov veik føroysk umsiting, so kann loysnin avgjørt ikki vera, at málið verður yvirtikið, tí tað fer bara at krevja uppaftur meira av umsitingini.

### Málið má loysast

Breið semja tykist vera um, at trupulleikar eru viðvíkjandi útlendingamálum, og at hesir trupulleikar skulu loysast. Men at yvirtaka málsøkið, uttan at hava nakra ítøkiliga ætlan fyri, hvat skal henda aftaná yvirtøkuna, tað loysir einki. Her mugu vit taka í egnan barm, og ikki geva øðrum skuldina fyri alt, sum ikki gongur sum tað skal í Føroyum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14$^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.